# Nógvir pengar til jólagávur



Jólamaðurin, sum kemur við ókeypis pakkum til smá og stór, er eftir øllum at døma ikki so neyðugur allastaðni. Ein kanning, sum er gjørd í Danmark, vísir, at hvør dani í miðal fer at brúka 2.654 krónur til at keypa jólagávur fyri. Hetta talið man neyvan verða lagt frá einum føroyskum miðaltali.

Tað er Webpol, sum hevur gjørt kanningina fyri Ekstrablaðið, og niðurstøðan er, at fleiri pengar enn nakrantíð verða brúktir til jólagávur í ár.

- Vit vænta púra vist, at fólk fara at brúka meira pengar til jólagávur í ár, enn tey gjørdu í fjør. Hetta sæst millum annað aftur í, at jólagávurnar verða størri, sigur Jan Poulsen, sum er leiðandi økonomur í Dansk Handel og Service, við Ekstrablaðið.

Leiðandi økonomurin í BG Bank hevur eisini eina frágreiðing um, hví danir brúka meira pengar enn nakrantíð áður í jólamánaðinum.

- Fólk hava ráð til at halda jól. Arbeiðsloysið er fallið, og nógv fólk hava fingið lønarhækking í hesum árinum. Rokna tú eisini upp í, at bensinið og hitin eru blivin bíligari, so hava fólk fleiri pengar til at brúka undan jólum, sigur Anne Burchardt við Ekstrablaðið.

Eitt rák er, at pør geva hvørjum øðrum størri jólagávur, enn børnini fáa. Ofta hevur verið hildið, at jólagávurnar serliga eru til at gleða børnini, men kanningin hjá Webpol vísir, at fólk í miðal brúka fleiri pengar til at keypa makanum eina gávu, enn tey brúka til børnini.


























